e-mail: jakup@sosialurin.fo

# ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið alt um ítróttin um vikuskiftið í týsdagsblaðnum ella á: www.sosialurin.fo

## Megnar Neistin at reisa seg?

*Hondbólturin um vikuskiftið: Tey bæði tapandi liðini í steypafinalunum skulu hvør í sínum lagi royna at basa oddaliðunum hetta vikuskifti. Størsti spenningurin man helst vera um, hvørt Neistin megnar at reisa seg leygardagin*

JÁKUP MØRK

Ikki færri enn seks hondbóltsdysir skulu leikast hetta vikuskifti. StÍF stendur ikki til at spæla nakran dyst, og tískil eru tað eingir dystir, sum skulu strikast úr skránni.

**Stríð um silvurmerkini**
Hjá kvinnnunm verður fyrsti dysturin leygardagin, tá bestu kvinnuliðini hjá Neistanum og VÍF hittast uppi á Hálsi. Í løtuni eru hesi bæði liðini jøvn á øðrum og triðja plássi, men VÍF hevur leikt ein dyst minni.

Um os er, at Neistin megnar at vinna henda dystin, kunnu tær ota seg upp á eitt annað pláss, og enn tá hava ein dyst til góðar í mun til liðini undir sær.

Teir báðar dystirnar í grundspælinum vóru tað tó vestmannagenturnar, ið vóru omaná, og vinna tær dystin leygarkvøldið, kunnu tær styrkja enn meira um støðuna á stigatalvuni.

Lítið er at ivast í, at ein møguligur tapari í dystinum leygardagin fer aftur á fjórða plássið í kappingini. Nýkosnu steypavinnararnir úr Kyndli er í løtuni tvey stig aftan VÍF og Neistan, og sunnudagin skulu tær so royna seg móti Tjaldur. Enn hevur Tjaldur einki stig fingið hetta kappingarárið, og alt annað enn ein greiður kyndilssigur vildi verið ein rimmar sensatión sunnudagin. Møguleikin fyri hesum tykist tó fjarður.

Sunnudagin skal VB royna at reisa seg eftir vónbrotið í steypafinaluni, tá tær á heimavølli fáa vitjan av Stjørnuni. Á pappírinum er einki at ivast í, at Stjørnan er greiður favorittur undan dystinum, men finnur VB spælið frá finaluni fram aftur, kunnu tær sanniliga geva klaksvíksgentunum dygga mótstøðu.

**Stórdystur leygardagin**
Hjá monnunum verður talan um bæði oddabrak og botngysara hetta vikuskiftið.

Leygardagin tekur Neistin móti VÍF í einum dysti sum kann fáa alstóran týdning fyri leiklutin hjá havnarliðnum hetta kappingarárið. Eftir vónbrotið seinasta vikuskifti, er lítið at ivast í, at Neistin nú satsar alt upp á FM-heitið, men spurningurin er hinvegin eisini, um teir sinniliga eru komnir nóg væl fyri seg.

Í løtuni liggur Neistin á triðja plássi, tvey stig aftan fyri VÍF og StÍF, men havnarmenninir hava leikt ein dyst minni enn tey bæði ovastu liðini.

Sunnudagin skal hitt havnarliðið, steypavinnararnir úr Kyndli, royna seg móti Tjaldur. Eins og í kvinnudystinum hjá somu liðum, eru mannfólkini hjá Kyndli greiðir favorittar sunnudagin, og hava teir fingið armarnar so nøkunlunda niður aftur eftir steypasigurin, er einki at ivast í, at stigini koma til høldar í hesum dysti.

Í Vestmanna skulu tvey av botnliðunum, KÍF og H71 royna at skrykkja seg leysan úr botninum. H71 hevur í løtuni fýra stig, og megna teir at leggja tvey afturat sunnudagin, verður eitt andarúm upp á trý stig niður til KÍF og Tjaldur. Hinvegin kann KÍF við einum sigri lyfta seg tvey pláss upp, við tað at teir tá fara fram við Hoyvíkingunum.

**Rætting**
Í hósdagsblaðnum skrivaðu vit at Sophus Dahl Christiansen nú skal taka sær av kvinnuliðnum hja Kyndli. Í hesi grein skrivaðu vit av misgávum, at Bárður Johannesen hevði tikið sær av liðnum, *síðani Flemming Raben fyrr í ár varð settur frá sum venjari*.

Hetta er sjálvsagt **ikki** rætt. Sum vit eisini fyrr hava skrivað, so bað Flemming sjálvur um at verða loystur frá teirri uppgávuni. Leiðslan í Kyndli hevur gjørt okkum varug við mistakið, og biðja vit Flemming um at orsaka okkum hetta mistakið.

Flemming hevur síðani tá røkt fleiri uppgávur fyri Kyndil, og er leiðsla felagsins væl nøgd við hetta samstarv, sum væntandi fer at halda á fram í komandi kappingarári.

### Støðan undan vikuskiftinum

**1. deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 369 | 284 | 85 | 15 |
| 2 VÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 356 | 319 | 37 | 11 |
| 3 Neistin | 3 | 3 - 0 - 0 | 278 | 266 | 12 | 11 |
| 4 Kyndil | 3 | 1 - 0 - 2 | 308 | 274 | 34 | 9 |
| 5 VB | 3 | 1 - 0 - 2 | 324 | 333 | -9 | 6 |
| 6 Tjaldur | 4 | 0 - 0 - 4 | 247 | 406 | -159 | 0 |

**1. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 497 | 393 | 104 | 19 |
| 2 StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 498 | 427 | 71 | 19 |
| 3 Neistin | 4 | 4 - 0 - 0 | 482 | 405 | 77 | 17 |
| 4 Kyndil | 5 | 3 - 0 - 2 | 474 | 420 | 54 | 13 |
| 5 H71 | 5 | 1 - 0 - 4 | 406 | 482 | -76 | 4 |
| 6 Tjaldur | 5 | 0 - 0 - 5 | 417 | 526 | -109 | 3 |
| 7 KÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 375 | 496 | -121 | 3 |

## Týðandi dystur fyri TB

*Flogbóltur: Skal TB gera sær nakrar vónir um meistaraheitið, so skulu tær vinna dystin móti Mjølnir um vikuskiftið. Vinnur Mjølnir er meistaraheitið avgreitt*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fýra dystir verða í meistaradeildini í flogbólti um vikuskiftið. Tveir í kvinnudeildini og tveir í mansdeildini. Dysturin í mansdeildini millum ÍF og Mjølnir varð leiktur í gjárkvøldið, tann millum TB og Mjølnir í kvinnudeildini verður leiktur sunnudagin. Hinir báðir verða leiktir leygardagin.

Í høllini í Trongisvági hittast TB og Mjølnir. Hetta er endurtøka av fyrsta dystinum í ár, sum TB vann, men síðani tá, hevur Mjølnir vunnið tað, sum er at vinna.

Í løtuni er støgan tann, at Mjølnir er á fyrstaplássi við 13 stigum, trimum fleiri enn TB, sum hevur 10 stig, men fyri tíggju dystir. Ein færri enn øll hini liðini. Tí hevur dysturin móti meistarunum úr Klaksvík ótrúliga nógv at siga fyri TB. Ætla tær sær gull, so skulu tær heilt einfalt vinna. Tá vera tær bert tað eina stigið aftanfyri Mjølnir og kunnu avgera tað sjálvar, tá liðini hittast seinni í hesum kappingarárinum. Ætlar TB sær hinvegin silvuri er ein sigur ikki at forakta nú, tí so er TB trý stig frammanfyri Drátt á triðjaplássi.

Kortini fara vit at geva Mjølnir heitið sum favorittar, og tað er av teirri orsøk, at tær higartil í ár hava verið so burtur av tað sterkasta liðið.

Hin dysturin í kvinnudeildini verður leiktur á Kambsdali, har Dráttur vitjar ÍF. Her eigur Dráttur at vinna, men við ÍF veit mann ongantíð rættuliga. Hava tær ein góðan dag, kunnu tær gera øllum hinum liðunum lívið súrt, og seinast hesi bæði liðini hittust var tað um reppið at ÍF vann. Skal ÍF gera sær vónir at faa Fleyr aftur í kappingini um næstaftasta pláss skal hesin dysturin vinnast. Hjá Drátti er støðan tann sama, tí skulu tær hava TB aftur í kappingini um silvuri, so skal hesin dysturin vinnast.

**Berjast um annaðplássi**
Hjá monnunum spældu ÍF og Mjølnir á KIambsdali í gjárkvøldið. Sambært skránni skuldi hesin dystur verið leiktur í dag, men hann varð fluttur fram av ókendum orsøkum. Seinast liðini spældu á Kambsdali vann ÍF heilt óvæntað dystin, og júst tann ósigurin hevur gjørt sítt til, at Mjølnir ikki kemur longur enn at kappast um annaðplássið í ár.

ÍF hevur hinvegin nakað at vísa, tí fyri viku síðani vunnu teir útsetta dystin móti SÍ og vinna teir henda dystin lata teir sørvingum niðasta pláss í kappingini. Fuglfirðingar kunnu spæla væl, men vit meta ikki, at teir koppa Mjølnir um vikuskiftið.

Seinasti dysturin um vikuskiftið verður á Eysturskúlanum klokkan 15.00. Hesin dystur er millum Fram og SÍ og er eins týdningarmikil fyri hesi bæði liðini. Fram kappast um annaðplássið og skal vinna, og SÍ berjist fyri at sleppa undan aftasta plássi.

Eftir styrkini nú, fara vit at loyva okkum at siga, at tað verður Fram sum vinnur dystin, tí tað hevur gingið SÍ illa í hond í seinastuni. Tá liðini hittust í Eysturskúlanum seinast, tók SÍ Fram á bóli og vann tann dystin. Móti spælinum kanska, men kortini.

Nú fáa Framleikararnir so høvið til at siga takk fyri seinast og tað rokna vit við at teir gera. Alt í alt eitt vikuskiftið við møguleika fyri góðum flogbólti




*Megnar TB at basa klaksvíksgentunum enn eina ferð, ella verður longu nú staðfest, at Mjølnir er Føroyameistari?*

2 ´arin

Leygardagur 12. februar 2000

## Markið



- Eg haldi, at mørkini er sera greið. Vit skulu bjóða tað fram, sum onnur ikki megna at fáa hendaveg. Og okkum nýtist ikki at leggja okkum eftir tí, sum ítróttarhallirnar megna, sigur Helga Hjörvar um leiklutin hjá Norðurlandahúsinum

# Tann størsti heiðurin

**HEIÐUR.** Føroyski filmurin Bye Bye Blue Bird vann stórfingna virðisløn á virda filmsfestivalinum í Rotterdam sunnudagin.Hetta er fyrstu ferð, at ein norðurlendskur filmur vinnur hesa virðislønina

*Eyðun Klakstein*

Eitt konufólk, sum seldi atgongumerki í einum biografi í Keypmannahavn, ávaraði fólki ímóti hesum føroyska filminum.

Danska Filmsinstituttið valdi aðrar danskar filmar at umboða Danmark á filmsstevnuni í Rotterdam.

Men tá avtornaði, stóð føroyski filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir, Bye Bye Blue Bird, eftir sum tann stóri vinnarin.

Fyri fyrstu ferð fekk ein norðurlendskur filmur tiltiknu VPRO Tiger Award, og hetta hendi tá stevnan í Rotterdam varð hildin fyri 29. ferð.

– Hetta er tann størsti heiðurin, eg nakrantíð havi fingið, sigur Katrin Ottarsdóttir, sum eftir virðislønina mátti finna seg í einum havi av blitsljósum, og at altjóða bløð høvdu stóran áhuga fyri henni.

Okkurt um 2000 útlendskir gestir vóru á filmsstevnuni, sum er tað størsta mentanartiltakið í Hollandi. Fleiri enn 300.000 fólk vóru og hugdi eftir filmum, sum vórðu vístir á stevnuni, og ein av teimum fáu filmunum, sum varð sýndur fyri fullum sali øll kvøldini, var Bye Bye Blue Bird.

**Púra paff**
Umframt at nógvir filmar verða sýndir á stevnuni, sleppa eisini nakrir teirra við í kappingina um tær tríggjar virðislønirnar. Ongin danskur filmur er enn sloppin við í kappingina, og tí kom tað óvart á øll, at Bye Bye Blue Bird var útnevndur til kappingina.

– Eg var púra paff, tá eg fekk tað at vita, og eg roknaði als ikki við, at filmurin skuldi fara at vinna nakra heiðursløn. Men eftir at eg hevði verið á stevnuni og sæð, hvussu stórur áhugi var fyri filminum, og hvussu væl fólki dámdi hann, fekk eg

*(framhald á næstu síðu)*



**– Tað er ein lætti at sleppa undan fordómunum hjá dønum, tá eg eri á filmsstevnum í Týsklandi og Hollandi, sigur Katrin Ottarsdóttir. Filmurin hjá henni, Bye Bye Blue Bird, er sæddur av færri enn 2000 dønum, men hevur vunnið tvær altjóða virðislønir**